# ítróttur

Nr. 137 • fríggjadagur • 19.juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# VB bráðnaði í nógva hitanum

**Slavia Mozyr skoraði fimm mál fyrsta hálva tíman, og so var einki at spæla um**

Tað gekst hjá VB, sum tað so ofta hevur gjørt, tá føroysk feløg í Europa Cup hava roynt seg á útivølli.

Eftir góða avrikið og málleysa javnleikin á heimavølli ímóti Slavia Mozyr úr Hvítarusslandi, so komu vágbingar av álvara í eldin, tá teir mikukvøldið royndu seg á útivølli.

Slavia Mozyr vann 5–0. Hetta var støðan longu tá 31 minuttir vóru farnir. Sambært heimasíðuni hjá UEFA tók heimaliðið sær síðani av løttum. Teir høvdu væl og virðiliga vunnið sær sess í næsta innleiðandi umfarinum, og so nýttust teir ikki at skora fleiri mál.

## Sjálvmál beinanvegin

Hjá VB ráddi um at halda tørn so leingi, sum tað bar til. Um teir høvdu hildið tætt nóg leingi, so var roknandi við, at heimaliðið fór at ótolnast, og um teir høvdu slept í verjupartinum, so hevði møguleikin kanska komið at skora týdningarmikla málið á útivølli.

Men soleiðis lagaði tað seg als ikki. Longu í 3. minutti vóru vágbingar so óhepnir, at teir gjørdu sjálvmál, og so gekk skjótt. Sjálvmálið kom, tá liðformaðurin hjá VB, Eyðun Jacobsen, royndi at beina einum innleggi burtur, men bólturin fór í staðin í málið aftanfyri Bjarna Johansen.

Slavia Mozyr skoraði aftur í 11., 23., 28. og 31. minutti. Stóri málslúkurin var Strypeiki, sum var nummar ellivu og annar av álopsmonnunum, tá liðini mikukvøldið í síðstu viku spældu á Tórsvølli. Hesin spælarin skoraði trý mál, m. a. til 5–0 upp á brotsspark, sum varð dømt ímóti Predrag Zivkovic.

Kiril Rybakov skoraði til 2–0. Í fyrra dystinum avloysti hann beinanvegin eftir steðgin annan álopsmannin.

## Hitin plágaði

Umstøðurnar hjá vágbingum vóru einki serligar. Vit skilja á lagnum, at gistingarhúsið, sum teir búðu á, var einki at rópa hurrá fyri, og á vøllinum høvdu teir tað sera torført. Hitastigini vóru omanfyri tredivu, meðan teir spældu.

VB var í útgangsstøðuni mannað við teimum somu ellivu, sum spældu á Tórsvølli. Onkra ferðina var VB framvið, og aftur hesa ferð var Palli Augustuinussen næst við at fáa mál. Í 1. hálvleiki bjargaði málverjin langskoti frá vongspælaranum í høgru, og í 2. hálvleiki fór skotið við síðuna av.

Stutt undan steðginum gjørdi Popczynski av at gera tað fyrstu útskiftingina. Tá kom Dan Djurhuus inn fyri Birgir Jørgensen.

Í 2. hálvleiki gjørdi vóru fleiri broytingar gjørdar. Eitt nú fór Predrag Zivkovic úr verjuni og longri fram á vøllin at spæla.

## Hagtøl

**Europa Cup fyri meistarar**

1. innleiðandi umfar – 2. dystur

**Slavia Mozyr–VB 5–0 (5–0)**
Á Yunost stadion í Mozyr í Hvítarusslandi mikudagin 18. juli 2001 kl. 18.00
2.500 áskoðarar
**Dómarakvartett úr Írlandi:** John McDermott, John Ward, Joseph O'Brien og Patrick Whelan

**1–0:** sjálvmál 3.
**2–0:** Valery Strypeikis 11.
**3–0:** Kiril Rybakov 23.
**4–0:** Valery Strypeikis 28.
**5–0:** Valery Strypeikis br 31

**VB:**
1. Bjarni Johansen – 13. Predrag Zivkovic, 11. Jón Gærdbo (12. Marner Richardt, 60.), 4. Eyðun Jacobsen, liðformaður, 2. Magni Jacobsen – 9. Palli Augustinussen, 14. Marek Wierzbicki, 10. Tórður Holm 20. Jón Pauli Olsen (6. Michael í Lágabø, 60.), – 19. Birgir Jørgensen (7. Dan Djurhuus, 42.), 15. Robert Cieslewicz
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Finnbogi Olsen, 5. Oliver Abrahamsen, 17. Kári í Lágabø, 18. Gisli Sveinbjørnsson

**Venjari:** Krysztof Popczynski
**Hjálparvenjari:** Páll Augustinussen
**Liðleiðari:** Kári Poulsen
**Fysioterapeutar:** Kirsten Ludvig og Turid Kjærbo
**Lækni:** Viggo Jensen

## Sama søgan

Tað hevur ofta verið tikið til, at føroysku feløgini standa seg verri í altjóða høpi, enn landsliðið ger. Landsliðið tapti stórt ímóti Jugoslavia á heimavølli fyri stuttum, men tað kemur ikki so ofta fyri longur, at landsliðið leggur rygg til stórtap.

At feløgini tapa meiri er ikki so undarligt, tí tey hava nógv færri altjóða royndir.

Úrslitini mikukvøldið vístu, at fleiri hava tað torført á útivølli. Vit kunnu t. d. nevna, at Valetta FC av Malta tapti 5–0 í Finnlandi, eftir at teir á heimavølli høvdu megnað málleysan javnleik. Mótstøðuliðið hjá teimum var FC Haka. Hetta er sama liðið, sum fyri tveimum árum síðani smurdi HB av 6–0, eftir at úrslitið á Tórsvølli hevði verið 1–1. Ta ferðina skoraði Magni á Lakjuni – hetta er framvegis einasta altjóða málið, sum er skorað á Tórsvølli.

Eftir at Haka hevði vunnið stórt á HB, løgdu teir rygg til stórtap ímóti Glasgow Rangers. Mikukvøldið í komandi viku og annað mikukvøld fæst at síggja, hvussu tað fer at roynast hjá Slavia Mozyr, tá teir skulu spæla ímóti Bratislava.

VB ferðalagið kemur aftur til Føroya í dag. Nú fara teir at fyrireika seg til átta tey síðstu umførini í landskappingini. Málið er at røkka triðja plássinum og harvið nýggum møguleika fyri altjóða fótbólti.

**jh**





# Verjuskip sum souvenir



*Tveir sjómenn av »gamla slagum« Søren Hansen, skipari, og Karsten Jensen*
Mynd: Jens K V

**Skipið plagdi at sigla sum sjóverjuskip í ísfylta havinum kring Grønland, men nú er »Nukik« á veg til Nykøbing Falster sum souvenir hjá eigaranum. Hesar seinastu tríggjar dagarnar hevur skipið ligið á Havnini har teir fýra sjómenninir umborð hvíla seg til tað, sum eftir er av ferðini**

SKIP
*Rúnar Reistrup*

Á brúnni umborð á »Nukik« sita tveir hvítthærdir og skeggvaksnir menn, sum í øllum brøgdum líkjast sjómonnum frá tíðini, tá skip vóru úr træi og navigeringin fór fram við sekstanti.

Søren Hansen situr í skiparastólinum. Hann eigur skipið og hevur leiklutin sum skipari umborð. Søren hevur búð í Grønlandi seinastu fimm árini, har hann hevur arbeitt í grønlendsku orkuveitingini, men tá hann fekk arbeiði bjóðað á Nykøbing Falster, gjørdi hann av at fara heim aftur til Danmarkar.

Men oftast vilja fólk ikki fara frá einum landi tómhent. Tey vilja hava okkurt tinganest við sum minni – ein souvenir.

Søren Hansen tók ett gamalt verjuskip við heimaftur.

## Piðað rov

»Nukik« varð bygdur á Bogense Bådbyggeri í 1962 og fór beinanvegin í sigling sum sjóverjuskip í havinum kring Grønland. Seinastu árini hevur skipið bara ligið, og tá Søren Hansen keypti tað, líktist skipið einum piðaðum rovi. Einki tól var á brúnni, og skipið var illa farið alt sum tað var.

Tað tók skipaeigaranum og teimum trimum monnunum úr Danmark, sum hann hevur fingið at hjálpa sær, ein góðan mánað at seta skipið og so frægan stand, at tað fekk loyvi at sigla. Søren Hansen væntar at tað fer at taka honum eini fýra ár at putlast við at umvæla skipið. Tá tað er gjørt fer hann at sigla leigutúrar við ferðafólkum við skipi sínum.

## Undrast yvir áhugan

Teir fýra sjómenninir løgdu leiðina úr Arsuk í suður Grønlandi til Reykjavíkar fyri góðum fjúrtan døgum síðan. Túrurin til Reykjavíkar tók teimum hálvtsjeynda samdøgur. Síðan løgdu teir leiðina til Føroya og eftir trimum samdøgrum komu teir á Havnina. Herfrá fara teir víðari til Hetlands.

Skiparanum dámdi lítið viðferðina teir fingu frá havnamyndugleikunum í Reykjavík, men honum dámar væl á Havnini.

– Tá vit komu til Reykjavíkar var tað ein øgilig rúgva av formellum pappírum, ið skuldu fyllast út og undirskrivast og vit skuldu gjalda fyri bæði eitt og annað. Millum annað fingu vit eina rokning á yvir túsund krónur fyri »nýtslu av vitum«. Tað kostaði okkum upp ímóti trýtúsund krónur at fara inn í Reykjavík og vera har í tvey samdøgur. Her á Havnini gjalda vit 80 krónur um dagin, sigur Søren Hansen.

Umborð á »Nukik« undrast teir yvir tann stóra áhuga, sum føroyingar tykjast hava fyri skipum.

– Her ganga fólk allan dagin og hyggja og koma umborð ella koyra tey spakuliga framvið, og nú koma tit, sigur hin maðurin á brúnni, Karsten Jensen, við myndamannin og blaðmannin.

»Nukik« skuldi ætlandi leggja leiðina til Hetlands í morgun.



*»Nukik« fór í 1962 í sigling sum sjóveruskip í grønledskum sjógvi*
Mynd: Jens K V

# Føroyar niðanfyri miðstrikuna

**Á altjóða styrkislistanum hjá FIFA fyri landslið eru fimm europeiskar fótbóltstjóðir aftanfyri Føroyar, sum halda tørn um 119. plássið**

Í altjóða fótbóltssamgonguni FIFA eru 203 limir. Sambært styrkislistanum fyri juli, sum varð almennur í fyrradagin, so er føroyska landsliðið á 119. plássinum í heiminum. Hetta er sama plássið, sum Føroyar vóru á fyri einum mánað síðani, og hetta er tvey pláss longri niðri á listanum, enn Føroyar vóru um ársskiftið.

Fýra europeiskar fótbóltsstjóðir eru styrkismettar lægri enn Føroyar. Luksemburg er á 143. plássinum, Andorra er á 145. plássinum, Liktinstein er á 149. plássinum, og San Marino verður roknað at eiga vánaligasta fótbóltslandsliðið í Europa. Teir eru styrkismettir sum nummar 159.

Føroyar hava spælt ímóti øllum hesum tjóðunum. Í undankappingardystum hava Føroyar vunnið tvær ferðir ímóti San Marino og eina ferð ímóti Luksemburg. Í vinardystunum hava Føroyar vunnið á Liktinstein og spælt málleysan javnleik ímóti Andorra.

Næstu ferð at møguleiki verður at royna, um styrkismunurin, sum FIFA heldur er millum Føroyar og eitt av hesum londunum, sæst aftur á vøllinum, verður, tá Luksemburg kemur henda vegin at spæla HM undankappingardyst. Tað verður leygardagin 1. september.

## Málið

Dreymurin hjá øllum fótbóltshugaðum føroyingum er sjálvsagt, at Føroyar skulu koma sær longri fram á listan. Tí er ikki av leið at hyggja eftir, hvørjar europeisku tjóðirnar eru, sum ikki eru so langt omanfyri Føroyar.

Aserbaidjan luttekur í europeisku kappingunum. Teir eru á 113. plássinum. Norðurírland er á 106. plássinum, Wales er nummar 105, og Moldova er á 103. plássinum. Letland er nummar 95, Litava 94, Albania 85, Hvítarussland 84, Estland 80, Georgia 79, Makedonia 77, Kypros 76, Bosnia Hersegovina 75 og Sveis 62.

Føroyar hava spælt ímóti fleiri av hesum londunum. Góðu úrslitini vóru 2–0 sigurin í vinardytinum í Estlandi í 1997, 1–1 í EM undankappingardystinum ímóti Norðurírlandi í Belfast, málleysi javnleikurin í EM undankappingardystinum í Litava í 1998 og 2–2 í heimadystinum ímóti Bosnia Hersegovina í EM undankappingini fyri tveimum árum síðani.

Føroyar hava tapt tvær ferðir ímóti Kypros, Wales og Sveis í HM undankappingardystum og tvær ferðir ímóti Estlandi í EM undankappingardystum. Føroyar hava tapt eina ferð í undankappingardystum ímóti Norðurírlandi, Litava og Bosnia Hersegovina.

Eina ferð hava Føroyar og Aserbaidjan, sum altso er tað landið í europeiskum fótbóltshøpi, sum er tættast Føroyum á røttu síðuni, um vit kunnu siga tað soleiðis. Talan var um vinardyst í sambandi við venjingarlegu á Kypros í februar 1996. Føroyar taptu 3–0, og tá varð hetta mett sum stórt vónbrot.

## Brøðratjóðirnar

Danmark er tað norðurlandið, sum er styrkismett hægst í landsliðsfótbólti. Teir eru á 17. plássinum, sum er eitt lægri enn fyri einum mánað síðani, men sum er fimm hægri enn í desember í fjør. Svøríki er á 19. plássinum. Tað gongur rætta vegin hjá svium, sum í juni vóru á 21. plássinum og sum í desember vóru á 22. plássinum.

Hjá Noregi hevur tað roynst illa í HM undankappingini, og tað sæst aftur á listanum. Um ársskiftið var Noreg á 14. plássinum, og í juni vóru teir á 18. plássinum. Nú er Noreg nummar 21.

Ísland er nummar 52. Tað vóru íslendingar eisini í juni. Um ársskiftið var Ísland nummar 50. Finnland er nú styrkismett sum nummar 59. Hetta er sama plássið, sum finnlendingar høvdu í juni og desember.

## Endarnir

Støðan í toppinum er nett tann sama, sum hon var fyri einum mánað síðani. Fronsku heimsmeistararnir eru fremstir, og hóast tað hevur gingið av skriðuni hjá Brasilia nógvu tær seinastu ferðirnar, og spurningurin framvegis er opin, um fyrrverandi heimsmeistararnir fara at megna at spæla seg í HM endaspælið komandi summar, so er Brasilia framvegis nummar tvey. Argentina og Italia eru á næstu plássunum.

Týskaland var um ársskiftið á 11. plássinum. Nú er Týskaland nummar fimm, og so koma Spania, Paraguay, Kekkia, Holland, Rumenia, Jugoslavia, Meksiko, Kolombia, Ongland, og so kemur USA, sum er styrkismett at vera omanfyri Danmark.

Á 203. og aftasta plássinum er Montserrat. Henda fótbóltstjóðin er í Karibiska havinum. Víddin er 98 ferkilometrar, og har búgva tólv túsund fólk.

Næstaftast á FIFA listanum er kongaríkið í Himmalaya fjøllunum, sum eitur Butan. Har er víddin 47 túsund ferkilometrar, og fólkatalið er 1,5 millión.

Styrkislistin hjá FIFA verður dagførdur hvønn mánað. Næsta almanna kunngerðingin verður 22. august. Føroyar skulu næstu ferð spæla landsdyst mikudagin 15. august. Tað verður útsetti HM undankappingardysturin í Beograd.